lesarabrøv

Ábyrgdarleysar hvølpalótir

Vísandi til niðanfyri standandi donsku forvaltningslóg sæst, at sjúklingar hava fullan rætt at ráða fyri, um upplýsingar um sjúku og viðgerð teirra og barnanna kunnu verða givnir »viðari«. Hetta kann bert gerast við teirra skrivligu váttan.

Hetta er eisini galdandi fyri onnur sjúkrahús, læknar, kommunal- sum almennari sosialkontór v.m., og skrivliga váttanin — um hon verður givin — er bert galdandi í eitt ár.

Sjúkuskráseta er heldur ikki lýtaleys á nakran hátt. Kanningar av slíkum skráseting hava vist, at í 25% av førunum eru hesar skrásetingar beinleiðis skeivar. Á henda hátt kann ein og hvør verða skrásettur undir skeivari sjúku og vit kunnu so bert gita okkum til hvat hetta inniber av skeivum viðgerðum — eisini heilivági.

Sjúkrahústjórin og læknastjórin vilja hava hesa sjúkuskráseting, men hvørja nyttu ger hon, hvat skal hon brúkast til? Nógv vita tað, sjálvt um tey siga nakað annað.

Ein sovorðin sjúkuskráseting kann elva til ómetaligar trupulleikar fyri mong av teimum, sum eru ella hava verið sjúk. Hetta má tí støðgast í stundini.

Tað verður upplýst, at landsstýrið hevur góðkent hesa sjúkuskráseting frá sjúkrahústjóranum. Vit kunnu bert hugsa okkum til, hvussu teir »totaliteru statirnir« í 1930-árunum høvdu øvundað okkum hesa skráseting og hvat teir ikki kundu brúkt hana til.

Sum lið í sparingunum innan sjúkrahúsverkið hevði verið betri at avtikið sjúkahústjórastarvið, læknastjórastarvið og yvirlæknastarvið í arbeiðsmedisini, sum ongin tørvur er á í hesum lítla landi. Hesir hava bæði




Eingir upplýsingar um sjúklingin kunnu »gevast viðari« uttan undirskriving hansara av tílíkum skjali.

høli, kontórfólk, hópin av ferðaútreiðslum — eisini til útlond, so sum teir halda neyðugt vera, meðan teir hava tikið burtur útreiðslur til flutning av sjúkum fólki til kanningar. Deildir á sjúkrahúsinum verða stongdar stóran part av árinum og nýopereraðir sjúklingar verða heimsendir til familjuna at ansa.

Alt hetta verður gjørt móti teimum sjúku, meðan landssjúkrahúsið skal fyllast á tremur og meira afturat við nýggjum yvirlæknum, sum skulu hava høli, skrivarar og annars alt, hesir kunnu halda vera neyðugt, og slíkar ætlanir eru oftani kostnaðarmiklar.

Mottoið á sjúkrahúsinum er nú kanska »sjúklingarnar út og nógvar vaktberandi yvirlæknar inn« og kanska skulu veruligu yvirlæknarnir ikki longur hava ta vaktbyrðu, sum verið hevur upp igjøgnum tíðirnar.

Sjálvur havi eg havt vaktbyrðu alla mína tíð sum lækni.



Roskilde Amts Sygehus Køge

I henhold til den nye forvaltningslov er det ikke længere tilladt, at indhente oplysninger fra andre sygehuse, læger, sociale kontorer ved amt og kommune m.v. uden skriftlig tilladelse fra patienterne.

I forbindelse med Deres behandling på RASK vil det jævnligt være nødvendigt at indhente eller videregive oplysninger om Deres sygdom og behandling / Deres barns sygdom og behandling.

Derfor beder vi Dem venligst underskrive nedenstående erklæring.

SAMTYKKEERKLÆRING

Undertegnede giver hermed mit samtykke til, at der fra RASK må indhentes og videregives oplysninger, således som det nærmere er angivet nedenfor.

☐ Oplysninger må indhentes fra og videregives til alle sygehuse, læger og sygeplejemæssige institutioner, såfremt oplysningerne skønnes at have betydning for vurderingen og behandlingen af min aktuelle sygdom.

☐ Oplysninger må videregives til og indhentes fra sociale kontorer ved amt og kommune, der varetager en sag vedrørende mine helbredsmæssige forhold.

NAVN :

CPR-nr. :

ADRESSE :

Dato Underskrift

Denne tilladelse er gyldig i 1 år fra dato.

Argir, 14.5.1991
Johan Djurhuus

Sakarmál fyri afturlatnum hurðum!

Hin 14. mai í ár var sakarmál fyri afturlatnum hurðum í rættinum í Oslo. Málið snúði seg um, um myndugleikarnir hava rætt at flyta eldri fólk, ið eru á aldursheimi, til eitt annað aldursheim nærindis, uttan at spyrja búfólkið. Eldri maður — sterkur á málinum — helt tað vera óforskammað at bera seg so at móti fólki, og so har-afturat at nokta teimum, sum eru partur í málinum, atgongd til rættarhølið.

Sakførarin fyri myndugleikarnar forsvaraði seg við, at hetta var eitt princippmál, sum skuldi geraast av, og at tað her galt at spara pengar. Hann segði, at heimið, sum fólkið verður flutt á, stendur á gøtuni við síðuna av, og at hetta er eitt privat rikið aldursheim.

Fyristøðukvinnan á heiminum tók undir við eldra manninum. Hon segði, at hon helt, at myndugleikarnir kundu saktans havt ráðført seg við búfólkið. Tí heimið hevur verið opið seinastu 19 árini, og tað hevur virkað væl. Hon segði, at tað kostar 800 kr. um dagin at hava eldri fólk búgvandi á heiminum, og at tað fer at kosta 100 kr. minni um dagin fyri hvørt fólkið á privatrikna heiminum. Hon upplýsti eisini, at tað kostar 1800 kr. um dagin at hava fólk liggjandi á sjúkaheiminum nærindis, og at tað er »trygdekassen«, sum rekur sjúkaheimið, meðan tað er Oslo kommuna, sum rekur aldursheimið.

Eldri maðurin gavst ikki so. Hann segði, at bæði heimini verða rikin fyri skattapengarnar hjá teimum, sum búgva í Oslo, og at tey funnu seg ikki í at verða slongd soleiðis aftur og fram, uttan at verða spurd eftir.

Úrskurður verður í málinum um eina viku.

Sigið so, at eldri og óhjálpin ikki eisini føla sviðan av marglætinum, sum tamarleyst hevur spreitt seg um øll Norðurlond, og sum nú er steðgað upp, tí ongir pengar eru.

X

Janey

Vit hava hópin av
nýggjum vørum
Vit eru nú í
Gríms Kambansgøtu 4
Tlf. 18181

Myndin

23. apríl hevur Dimma eina mynd á síðu 16 (ikki 9) við 63 ára gamla »Ísvirkinum« á Tvøroyri og við horninum á »Marinens Kuldepot«, hvar gamla kommunala 3 rúms W.C. og p.s. hevði innivist. Skriftstaðið undir hesi mynd var: »Tvøroyrar Flakavirki sum mynd«.

Hví ikki bæði virkini á einari mynd og skriftstaðið undir: »Ein fyrimynd« — so hevði tað verið søguligt, so hevði tað verið rættvíst.

Men tú, Dávur Eliasen, hevur helst annað í huga enn at minna okkum á, hvør tað var, ið avreiddi tað mesta, sum á hasi myndini er. Tað eru teir, ið minnast kuppið í Kadarstreet og sjálvur ert tú, David Eliasen, ein av okkara dýrastu bygdarbrøðrum. Tú vekur ofta í okkum gomul minni um sjómansstovu — skótaliðið og ognir tess og um hvussu alt endaði. Bragd títt í hallarmálinum kunnu vit eisini merkja. Umsorgan tín fyri Eurofisk við einum møguligum SMS-líkum dótturfelag til eina skipatænastu her — er enn ikki avvíst. Tú litfagri tvørámaður, hvi leigar tú ikki Tv. Flakavirki, kanska saman við onkrum javnlika — eitt Remmerkupp sigst at vera, sjálvt á fronskum máli.

Tín ávaringarsjónleikur — »Vågn op — Vågn op« er ikki nøkur Rapsodi — men Raptus, tín roynd sum olja á bálið.

Her var lív, her var trivni. Virkið var supertekniskt fyrimyndarligt. So kom kvettið og enn hvílir henda deyða finningin manna millum — sjálvt hjá teim fáu, ið eftir eru har.

Tú brigdar okkum í búgvum her — at Tvøroyrar kommuna eigur 84% av partapeninginum í Tv. Flakavirki. Men hvør átti partapeningin áður — ikki David Eliasen, men tey somu sum standa aftanfyri tey 84%, nevnliga fjøldin í sóknini. Munurin er bert í hesum føri eitt púra logiskt tvang — eitt fyribrigdi, neyðugt til at varðveita einaræðishjúnalagið, ið fekst við loynisamráðingum um leigumálið av Tv. Flakavirki — og fyri at fáa tað upp á pláss, so mátti fyrst sprænast inn 10 mill. — so aðalstovnararnir kundu rekast til viks fyrst.

Sárini eru frísk. »Pine og Plage« er nýtt teldustýrt fiskaviðgerðartól kemur, so sum mest kann verða avgreitt á skrivstovunum.

Tú, David Eliasen, hevur so ongantíð verið við og nýtist ikki at blanda teg.

Vit vita at lýðkan í lofti ber fluguna við sær — og mong onnur kykn.

Carl Jespersen